ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

Fylgiskjal 50

**Kostnaður av at menna sosialar tænastur og -veitingar sbrt. tilmæli um tænastupolitikk**
Fíggjarligar avleiðingar av uppskoti til løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (saman við tvingsilslógini) eru lýstar í almennu viðmerkingunum til uppskotini. Niðanfyri eru beinleiðis fíggjarligu avleiðingarnar av lógarpakkanum settar upp í eina talvu. Talvan vísir, hvussu ymsar játtanir skulu tillagast komandi árini – bæði lógarbundnar veitingar og játtanir til stovnar og onnur endamál.

**Beinleiðis fíggjarligar avleiðingar av løgtingslóg um almannatrygd og tænastur og løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin (í tús. kr.)**

| Endamál | játtan | Æ 2021 | Æ 2022 | Æ 2023 | Æ 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| Ráðgevingarskylda | R | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Veitingar | L | 500 | - | - | - |
| Endurbót | L | 4.000 | 2.800 | 2.800 | 2.800 |
| Hjálpatólamiðstøðin | R | 500 | 500 | 500 | 500 |
| §2 Føroya Kærustovnur (Tvingsill.) | R | 1.000 | 1.000 | 1.000 | 1.000 |
| Skeið og advoktatútreiðslur (Tvingsill. ) | L/R | 500 | 500 | 500 | 500 |
| Flutt til § 11 Heilsumál v/Nainu | R | 350 | 350 | 350 | 350 |
| Flutt frá § 12 | L | -350 | -350 | -350 | -350 |
| Námsfrøðiligt eftirlit flutt til AMR | R | 250 | 250 | 250 | 250 |
| Námsfrøðiligt eftirlit flutt frá AV | R | -250 | -250 | -250 | -250 |
| **Samlaður kostnaður** | | **7.500** | **5.800** | **5.800** | **5.800** |
| ***Meirjáttan pr. ár*** | | **7.500** | **-1.700** | **0** | **0** |

Á virkisøkinum, sum uppskot til løgtingslóg um almannatrygd og tænastur fevnir um, eru tænastur, sum tørvur er á at menna og betra um. Talan er um bíðilistar til verandi tænastur, og talan er um tilboð, sum einans verða veitt lutvíst ella ikki verða veitt og um nýggjar tænastur. Tænastuparturin í lógini er ein rammulóg, ið gevur landsstýrismanninum heimild til at veita ymiskar tænastur - lógin ásetir ikki, hvørjar og á hvørjum stigi tær skulu veitast.

Í talvuni niðanfyri verður leysliga mett um kostnaðin av at hava vælvirkandi tænastur til tey, sum eru fevnd av løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Talan er ikki um útreiðslur, sum eru ein avleiðing av nýggju lógini, tí tørvurin er eisini í dag. Eins og í verandi forsorgarlóg er tað Løgtingið, sum frameftir umvegis løgtingsfíggjarlógina raðfestir tænastustigið.

**Mettur kostnaður av at veita vælvirkandi tænastur til málbólkin, sum er fevndur av løgtingslóg um almannatrygd og tænastur (tús. kr.)**

| | játtan | Æ 2021 | Æ 2022 | Æ 2023 | Æ 2024 |
|---|---|---|---|---|---|
| Stuðulstænasta | R | 1.000 | 2.000 | 3.000 | 4.000 |
| Viðlíkahaldsvenjing | R | 2.000 | 4.000 | 6.000 | 12.000 |
| Heimaráðgeving | R | 1.000 | 3.000 | 5.000 | 7.000 |
| Endurvenjing | R | 1.300 | 1.300 | 1.300 | 1.300 |
| Flutningstænasta* | R | - | - | - | - |
| Tænasta á bústøðum | R | 1.500 | 3.000 | 4.500 | 6.000 |
| Nøkta tørv til verandi tænastur | R | 10.000 | 20.000 | 30.000 | 40.000 |
| **Samlaður kostnaður** | | **16.800** | **33.300** | **49.800** | **70.300** |
| *Meirjáttan í mun til árið frammanundan* | | *16.800* | *16.500* | *16.500* | *20.500* |

**Viðm.: Ongin kostnaðarmeting fyriliggur*

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • E-mail: amr@amr.fo

Metingin omanfyri byggir á tilmæli frá arbeiðsbólkinum, sum í 2017 handaði táverandi landsstýrismanninum í almannamálum frágreiðing um tænastupolitikk. Øktar løgujáttan og lønarvøkstur er ikki við í metingini.